Nr. 102/2019

Sirið Stenberg
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um trygd og tilbúgving í Vága Floghavn, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvussu fara uppsagnirnar av starvsfólkum í Vága Floghavn at ávirka trygdina og tilbúgvingina ?
2. Er ætlanin at seta størvini aftur, nú flogferðslan økist aftur ?

Viðmerkingar:
Tað hevur verið alment frammi, at stórur partur av teimum uppsøgdu hjá Vága Floghavn vóru fólk, sum starvaðust við trygd og tilbúgving. Til dømis varð nevnt brunatrygd og trygdareftirlit sum heild. Tí er spurningurin, hvørja ávirkan hetta hevur á tilbúgvingina og trygdina á flogvøllinum.
Nú flogferðslan tekur seg upp aftur kann væl roknast við, at tørvurin á tilbúgving og trygd økist samsvarandi. Tí er spurningurin, um ætlanin er at seta størvini aftur.

Á Løgtingi, 12. juni 2020

Sirið Stenberg